**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

## Vit sóknast eftir einum starvsfólki til verkætlanararbeiði á tí Psykiatriska depilinum

Talan er um eitt 30-tíma tíðaravmarkað starv frá 1. november 2005 til 31. desember 2006.

Psykiatriski depilin á Landssjúkrahúsinum fer nú í holt við eina SB-verkætlan. SB er stytting fyri »starvsfólk við brúkarafortreytum«. Endamálið við hesari verkætlan er, at fáa sálarsjúk út aftur á arbeiðsmarknaðin.
Hetta er í samstarvi við psykiatriina í Århus Amt og »Videncentret for socialpsykiatri í Kbh.« og er okkara verkætlan ein av átta, sum tey eru farin í holt við.

**Førleikakrøv:**
- Viðkomandi útbúgving
- Hollar royndir innan psykiatri
- Teldukunnleiki
- Nýhugsandi og skapandi
- Kunna geva rúm fyri ótraditionellum loysnum
- Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvs- og samskiftisevni

**Arbeiðsuppgávur:**
- Kunna arbeiðspláss um SB-verkætlanina
- Samskifta við SB'ararnar
- Luttaka í rundborðssamrøðunum
- Gera fundarfrásagnir
- Hava samrøður við møguligar SB'arar
- Virka fyri, at brúkarasjónarmið koma við í tær nýskapaðu starvslýsingarnar
- At kunna kjakast og undirvísa áhugaðum um verkætlanina

Til nevnda starv ynskja vit okkum eina eldsál, sum kennir til arbeiðsmarknaðarviðurskifti og dámar væl at samskifta og samstarva við nógv og sera ymisk fólk.
Tað hevur stóran týdning, at tann, ið settur verður, dugir at orða seg bæði í skrift og talu og er opin og fyrikomandi. Fyrimunur er, at viðkomandi hevur kunnleika til lógarkarmin um vard størv.

Tann, sum settur verður, kemur at arbeiða út frá psykiatriska depilinum.

**Løn- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar** um starvið fáast við at venda sær til Magnus Isaksen, sosialráðgeva á Psykiatriska deplinum á telefon 304500, lokal 4160 ella Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á Psykiatriska deplinum á telefon 304500, lokal 4102, e-postur: bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 9. septembur 2005 kl.12.00
Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.

**Skrivlig umsókn** merkt »umsókn um starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til:

### Landssjúkrahúsið
Lønar og starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Pedagogar

## til Bústovnin og Sambýlið á Mýruvegi, Klaksvík

Undir Almanna- og heilsumálaráðnum og stovnum undir tí við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlinum á Mýruveg verður søkt eftir 2 pedagogum til setan 1. oktober, ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstørv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Á Bústovninum búgva 4 fólk við sjúkrageiningini autisma. Á Sambýlinum búgva 6 fólk, sum eru menningartarnað. Endamálið við okkara arbeiði er at skapa tryggar karmar hjá búfólkunum og at seta ígongd og skipa fyri virksemi, sum er til gagn fyri hvønn einstakan.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, er likamliga væl fyri og er áhugaður í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan.
Haraftrat er neyðugt at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva við onnur, umframt at vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum.

**Løn- og setanartreytir**
Størvini eru tænastumannastørv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið á lønarstigi 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Um eingin pedagogur søkir, verða størvini sett við hjálparfólki sambært sátttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við hjáløgdum prógvskjølum, viðmælum og C.V. skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 12. september.
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran á stovninum á tlf. 456310.

### Bústovnur og Sambýlið
**Mýruvegur 13**
**700 Klaksvík**
**Att: Leiðarin**

# Frá S & K felagnum

Eykaaðalfundur hjá S & K verður á Hotel Hafnia 10. september 2005 kl. 19.00.

**Evni á eykaaðalfundinum, er støðutakan til útliman úr FA.**

**Skrá:**
1) Val av fundarstjóra
2) Formaður felagsins hevur framløgu
3) Umboð frá Føroya Lívstrygging greiðir frá lívstryggingar og eftirlønarskipan
4) Orðið er frítt
5) Atkvøðugreiðsla um útliman úr FA

**Vinarliga**
**S & K felagið**

## HØLI Í MIÐBÝNUM TIL LEIGU
Frá 1. november, er Áarvegur 6 (Flogfelag Føroya) til leigu



Høli er í tveimum hæddum
- Niðara hæddin er 71 m2 (3m til loftið)
- Ovara hæddin er 26m2 (2,85m til loftið)

Hølið, ið liggur sera væl fyri, er væl egna til handilsvirksemi skrivstovu o.m.a.

Meira fæst at vita við at venda sær til:

**Hotel Hafnia**
ÁARVEGUR 4-10 · POSTBOKS 107 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON 31 32 33 · WWW.HAFNIA.FO

**Klaksvíkar kommuna**

## Líkvognur til sølu

Ein líkvognur av slagnum Volvo, árg. 88, verður hervið lýstur til sølu.
Boð undir kr. 30.000,- hava ongan áhuga.
Fleiri upplýsingar um bilin fáast frá Hans A. Johannesen á telefon 45 52 25 ella 22 63 55.

**Skrivlig boð kunnu sendast:**
Klaksvíkar kommunu
Postboks 2
700 Klaksvík
ella á klaksvik@klaksvik.fo

## BYGNINGUR TIL LEIGU/SØLU

**Orsakað av, at partar av virksemi okkara eru fluttir til Kollafjarðar, verða bygningar okkara Inni á Fjørð í Vestmanna lýstir til leigu/sølu. Talan er um í alt uml. 1.200 m², herav eru skrivstovuhølir 100 m² og handil 60 m²**

**Fjarðahús**
Timburhandil & Byggibúð
- tú velur væl -

LANGASANDUR
410 KOLLAFJØRÐUR
TEL. 472 000
FAX 472 001
FJARDAHUS@FJARDAHUS.FO
WWW.FJARDAHUS.FO